# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1006
# Tíðarskeið 10-24/03 2010

**Fólk frá HAV.:** Mourits M. Joensen, Regin Kristiansen, Jens Arni Thomassen og Jákup Reinert.

**Ábyrgd:** Jákup Reinert, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var annar túrurin av vár-yvirlitstrolingunum í ár. Høvuðsendamálið við hesum túrum er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Haraftrat skulu magar takast regluliga av toski, hýsu og upsa. Umframt skal vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið verða veidd, og tilfar til aldursgreining av havtasku og svartkjafti skal fáast til vega.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinshamn lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Kanningarøki:** Trolstøðirnar eru lagdar kring allan Landgrunnin grynri enn 500 m, sí mynd 1. Hetta eru støðir, ið eru tiknar á hesum báðum túrunum í vár, t.e. bæði á seinasta túri (1004) og á hesum túrinum (1006).




**Mynd 1**. Yvirlitstrolingar á vári við Magnusi Heinasyni. Landgrunnurin er býttur upp í 15 øki (myndin til vinstru). Ávíst tal á støðum verður tikið í hvørjum øki, tilsamans 100 støðir fyri allan Landgrunnin. Somu støðir verða tiknar á hvørjum ári.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini hóskvøldið 11/3 á midnátt. Av teimum íalt 100 trolstøðunum, ið verða tiknar á yvirlitstrolingunum á vári, vórðu 61 støðir tiknar fyrra túrin;

sostatt vóru 39 støðir eftir at taka á hesum túrinum. Byrjað varð at fiska fríggjamorgunin á eini støð í øki I beint norðan fyri Mykines, og so varð hildið á longur vestur og síðani suðuryvir vestanfyri. Leygarkvøldið 13/3 varð skurður tikin við termistorketu. Týskvøldið 16/3 sigldu vit inn á Toftir, har vit landaðu tíðliga morgunin eftir. Síðani varð farið útaftur at taka seinastu støðirnar. Leygarmorgunin 20/3 var seinasta støð tikin har norðuri á Munkagrunninum; síðan varð siglt á Toftir at leggja veiðuna upp, og so var farið á Havnina, har vit komu umleið kl. $17^{00}$. Tað viðraði væl á øllum túrinum, tó undantikið næstseinasta dagin, men sum heild eydnaðist túrurin væl, og ætlaða talið á støðum varð tikið. Tað eydnaðist ikki at taka punt II,1, hóast roynt varð tvær ferðir (fast, skrætt); í staðin varð puntur II,13 tikin. Puntur XII mátti takast tvær ferðir, tí yvirbreitilin slitnaði fyrru ferðina.

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært sýnishandbókini og kanningarætlanini, og eitt yvirlit yvir tal á nytru- og magaprøvum av ávikavist toski, hýsu, upsa, havtasku og svartkjafti sæst í talvu 1 niðanfyri. Samstundis sum nytrur vórðu tiknar, varð eisini skrásett longd, vekt, kyn og búningarstig, og regluliga vórðu magar av toski, hýsu og upsa tiknir og kannaðir umborð.

**Talva 1.** Yvirlit yvir nytru- og magaprøvar á Magnus Heinason túri nr. 1006.

| Toskur | Toskur | Hýsa | Hýsa | Upsi | Upsi | Svartkjaftur | Havtaska |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á nytraðum fiski |
| 305 | 109 | 396 | 89 | 269 | 69 | 46 | 16 |

| | |
|---|---|
| Tal á nytraðum fiski tilsamans: | 1032 |
| Tal á magum tilsamans: | 267 |

**Nær verða prøvarnir upparbeiddir:** Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar, og øll data løgd inn í databasu sum skjótast, helst áðrenn 14. apríl.

**Fyribils úrslit:** Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar, og øll data frá túrunum eru løgd í basu, ber til at siga nakað nágreiniligt um úrslitini av yvirlitstrolingunum á vári í ár, men nøkur ávegis úrslit skulu takast fram. Talva 2 vísir yvirlit yvir veiðuna av teimum ymsu fiskasløgunum á hesum túrinum; 37 fiskasløg vórðu veidd íalt umframt mathøgguslokk, agnhøgguslokk, hummara og ymiskt annað, ið er bólkað sum skrambul, t.d. grót, krossfiskar og igulker. Í somu talvu sæst eisini, á hvussu nógvum støðum, tey einstøku fiskasløgini eru fingin, t.e. hvussu vanlig tey eru. Nógv mest varð fingið av toski, og síðan koma ávikavist hýsa, lítli kongafiskur og upsi. Toskur varð fingin á 87% av støðunum, hýsa á 85%, lítli kongafiskur á 79% og upsi á 77% av støðunum.

Um allar støðirnar í vár verða lagdar saman (báðir túrar), fæst ein heldur øðrvísi mynd (Talva 3). Á teimum 100 støðunum vórðu veidd 46 ymisk fiskasløg, ið er nakað fleiri enn vanligt; umframt vórðu hummari og 3 sløg av høgguslokki fingin. Nógv mest var av toski, og síðan koma ávikavist hvítingsbróðir, upsi, hýsa, lítli kongafiskur og gulllaksur. Hýsa varð veidd á 87% av støðunum, toskur á 86%, upsi á 83% og lítli kongafiskur á 72% av støðunum.

Størsti denturin á hesum túrum verður lagdur á tosk, hýsu og upsa; men eisini fyri onnur sløg fast ein ábending um, hvussu nógv er til. T.d. er hvítingsbróðir vaksin nógv seinastu 4 árini og tykist vera heilt væl fyri, og longa, brosma, lítli kongafiskur og

gulllaksur tykjast eisini væl fyri; hinvegin hevur verið lítið til av svartkjafti seinastu 4 árini.

Á myndunum 2-4 sæst veiða upp á roynd frá yvirlitstrolingunum á vári (allar 100 støðir) fyri ávikavist tosk, hýsu og upsa. Veiða upp á roynd verður vanliga nýtt sum eitt mát fyri, hvussu stórir stovnarnir eru í vekt. Tølini fyri upsa skulu tó takast við stórum fyrivarni, tí slíkar yvirlitstrolingar vísa seg at vera rættuliga óneyvar fyri upsa; hetta skyldast m.a., at upsi ofta gongur í torvum. Verður rakt við eina torvu, so fæst nógv, annars fæst lítið, og úrslitið sigur tí ikki so nógv um, hvussu nógv er til í øllum økinum. Nakað tað sama ger seg galdandi fyri tosk í gýtingartíðini, sum er nú í mars. Tá savnast hann ofta og stendur tættur í smáum økjum. Verður tóvað á tílíkum økjum, fæst nógv, uttan at tað neyðturviliga merkir, at stovnurin er stórur.




**Mynd 2**. Veiða upp á roynd fyri tosk frá yvirlitstrolingunum á vári.

Við tí stóru roynd, ið er undir Føroyum, vil tilgongdin av ungfiski tey einstøku árini í stóran mun gera av, hvussu stórir stovnarnir eru. Av tí sama er stórur partur av stovnunum ungur fiskur. Og bæði stovnur og veiða vilja vera skiftandi ár undan ári, tí tilgongdin er skiftandi. Vektin á einstøku fiskunum hevur sjálvandi eisini týdning fyri, hvussu stór stovnsvektin er. Í ár vóru bæði toskur, hýsa og upsi hampiliga væl fyri.

Á mynd 2 sæst, hvussu skjótt toskastovnurin kom fyri seg aftur eftir tey sera vánaligu kreppuárini, og var orsøkin teir sera góðu árgangirnir frá 1992 og 1993. Eisini hýsa vaks skjótt (Mynd 3), og var tað her 1993 og 1994 árgangirnir, ið skaraðu framúr. Góð tilgongd hevur síðan fingið allar tríggjar stovnar at vaksa, men frá 2002 er toskastovnurin nógv minkaður til søguliga lág virði. Síðan 2007 er stovnurin vaksin aftur, men enn er langt eftir til støðið tey góðu árini; úrslitið í ár var eitt vet lægri enn í fjør. Alt bendir á, at toskastovnurin er í menning aftur, men júst hvussu nógv er trupult at meta um bert út frá hesum kanningum. Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar um einar tvær vikur, kann aldursbýtið í stovninum verða roknað, so at m.a. støddin á nýggjum árgangum kann verða mett. Men umráðandi er, at smáfiskurin fær frið at vaksa, so at toskastovninum veruliga kann koma fyri seg aftur.



**Mynd 3**. Veiða upp á roynd fyri hýsu frá yvirlitstrolingunum á vári.

Fyri hýsu er veiðan upp á roynd støðugt minkað síðan 2002, og var úrslitið í 2010 á leið tað í 1994 (Mynd 3); størsta orsøkin til hesa minking stavar helst frá vánaligari tilgongd í nógv ár. Minkingin seinasta árið var ikki stór, og nakað av smáari hýsu, gýtt í fjør, varð fingin í ár, so helst eru glottar fyri stavn eisini fyri hýsu.

Havandi í huga ta stóru óvissu við slíkum kanningum av upsa, so er ein varislig niðurstøða helst, at upsastovnurin hóast í minking enn er lutfalsliga væl fyri (Mynd 4).




**Mynd 4**. Veiða upp á roynd fyri upsa frá yvirlitstrolingunum á vári

.

*23. mars 2010* *<u>Jákup Reinert</u>*

| Talva 2. Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á túri 1006<br>39 støðir íalt | | |
|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **Veiða, kg** | **Støðir við fiski, %** |
| Toskur | 13070.730 | 87 |
| Hýsa | 2170.100 | 85 |
| Lítli kongafiskur | 1449.377 | 79 |
| Upsi | 964.061 | 77 |
| Hvítingsbróðir | 357.377 | 41 |
| Longa | 340.625 | 51 |
| Gulllaksur | 329.498 | 31 |
| Stóri kongafiskur | 270.945 | 31 |
| Trantkongafiskur | 255.285 | 10 |
| Reyðsprøka | 205.022 | 44 |
| Hvítingur | 121.102 | 23 |
| Knurrhani | 112.564 | 44 |
| Brosma | 109.655 | 28 |
| Havmús | 109.646 | 5 |
| Sandsprøka | 96.008 | 41 |
| Glaskvoysa | 86.483 | 26 |
| Havtaska | 85.915 | 26 |
| Svartkjaftur | 73.302 | 13 |
| Skrambul | 72.065 | 77 |
| Tunga | 60.085 | 72 |
| Blálonga | 44.790 | 10 |
| Lálla | 36.154 | 10 |
| Mathøgguslokkur | 35.960 | 62 |
| Halahvassa skøta | 31.690 | 5 |
| Silvurmurtur | 27.799 | 8 |
| Spískaskøta | 24.920 | 3 |
| Búksvarti hávur | 10.901 | 3 |
| Lítlabrosma | 10.145 | 5 |
| Liri | 7.315 | 3 |
| Hummari | 5.831 | 10 |
| Agnhøgguslokkur | 5.805 | 15 |
| Rognkelsi | 5.225 | 3 |
| Kalvi | 4.470 | 3 |
| Klingruskøta | 2.867 | 5 |
| Hvassasprek | 2.627 | 15 |
| Bláriddari | 2.172 | 5 |
| Nebbasild | 1.203 | 13 |
| Longubróðir | 0.685 | 3 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 0.274 | 3 |
| Kryttlingur | 0.229 | 3 |
| Makrelur | 0.080 | 3 |

**Talva 3. Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á vári 2010**
**Báðir túrar tilsamans - 100 støðir íalt**

| Fiskaslag | Veiða, kg | Støðir við fiski, % |
|---|---|---|
| Toskur | 23286.999 | 86 |
| Hvítingsbróðir | 12496.538 | 56 |
| Upsi | 8671.563 | 83 |
| Hýsa | 5374.017 | 87 |
| Lítli kongafiskur | 3897.238 | 72 |
| Gulllaksur | 3810.128 | 26 |
| Longa | 1375.837 | 63 |
| Hvítingur | 608.416 | 38 |
| Reyðsprøka | 553.014 | 41 |
| Stóri kongafiskur | 543.680 | 33 |
| Silvurmurtur | 510.631 | 6 |
| Brosma | 468.006 | 43 |
| Trantkongafiskur | 311.167 | 6 |
| Knurrhani | 301.081 | 34 |
| Svartkjaftur | 279.830 | 15 |
| Skrambul | 276.794 | 82 |
| Blálonga | 222.540 | 10 |
| Tunga | 209.152 | 62 |
| Sandsprøka | 174.508 | 39 |
| Kalvi | 165.345 | 3 |
| Havmús | 161.543 | 3 |
| Havtaska | 153.130 | 24 |
| Glaskvoysa | 115.572 | 13 |
| Kjaftsvarti hávur | 103.840 | 2 |
| Mathøgguslokkur | 99.962 | 45 |
| Hvassasprek | 73.245 | 24 |
| Rognkelsi | 58.575 | 9 |
| Lálla | 42.670 | 5 |
| Tindaskøta | 41.901 | 6 |
| Halahvassa skøta | 31.690 | 2 |
| Spískaskøta | 24.920 | 1 |
| Agnhøgguslokkur | 19.701 | 11 |
| Svartkalvi | 16.600 | 1 |
| Liri | 13.375 | 2 |
| Búksvarti hávur | 10.901 | 1 |
| Steinbítur | 10.350 | 2 |
| Lítla brosma | 10.145 | 2 |
| Hummari | 5.831 | 4 |
| Klingruskøta | 2.867 | 2 |
| Bláriddari | 2.172 | 2 |
| Sild | 1.703 | 2 |
| Nebbasild | 1.482 | 9 |
| Rossamakrelur | 0.778 | 3 |
| Longubróðir | 0.685 | 1 |
| Makrelur | 0.500 | 2 |
| Eledone | 0.266 | 1 |
| Lítli prikkafiskur | 0.260 | 1 |
| Kryttlingur | 0.229 | 1 |
| Glýsufiskur | 0.170 | 1 |
| Norskakvoysa | 0.018 | 1 |
| Lakssild | 0.001 | 1 |